# Umsitingarfólk til maskinverkstað

Fyri eina fyritøku í Streymoynni søkja vit eftir dugnaligum fólki at taka sær av at samskipa fyrisitingarligu uppgávurnar á maskinverkstaðnum. Maskinverkstaðið bjóðar fram tænastur innan umvælingar av maskinum og motorum, umframt smiðjuarbeiði. Á verkstaðnum starvast 8 fólk, men virkið hevur eisini annað virksemi, so tilsamans eru 35 fólk í virkinum.

**Arbeiðsuppgávur:**

Starvið er fjølbroytt og sjálvstøðugt. Viðkomandi kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við verandi verkstaðsleiðara, og skal virka fyri at arbeiðsuppgávur og avtalur verða samskipaðar - eisini fyrisitingarliga. Starvið inniber í høvuðsheitum hesar uppgávur:

- at menna sølu- og tænastuavtalur og veita verandi kundum eina góða tænastu.
- at hava eitt gott og positivt samskifti við kundar, sum venda sær til fyritøkuna.
- at útvega eykalutir til verkstaðið.
- at fyrisita arbeiðsseðlar og tímanýtslu, umframt aðrar uppgávur, ið náttúrliga hoyra til umsitingarliga partin av verkstaðsleiðsluni.

**Umsøkjarar:**

Vit søkja eftir einum persóni, ið er positivur og ágrýtin, hevur evni at samstarva við onnur og ikki er bangin fyri nýggjum avbjóðingum.

Vit vænta, at tú í minsta lagið hevur hesar førleikar:

- Tekniskt innlit og kunnleika um motorar helst arbeiðsroyndir
- Kann taka ábyrgd við støði í ásettum heimildum
- Dugir at nýta teldu og ymisk telduforrit
- Dugir at orða teg á enskum og donskum bæði munnliga og skrivliga
- Fer væl um og kann samskipa arbeiðsuppgávur við skili
- Er tænastusinnað/ur

Løn og setanartreytir verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Virkisráðgeving, Saltangará, telefon 44 95 91 og tosa við Duritu Djurhuus ella Símun Hammer. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknarfreistin er 1. februar 2004.

Hevur hetta starvið tín áhuga, so send eina umsókn til: Virkisráðgeving, Postrúm 26, FO-600 Saltangará og merk brævið "Umsitingarfólk til maskinverkstað"

Virkisráðgeving Spf

Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðskuskipanir

Heimasíða: http://www.konsult.fo

# Bilar við skaða til sølu

**Tryggingarfelagið Føroyar hevur bilar við skaða til sølu á heimasíðuni**

**www.trygging.fo**
**Tel. 345600**

Í løtuni kanst tú t.d. bjóða uppá ein Nissan Primera, Saab 9-5, Honda CR-V, Peugeot 307, Opel Astra, Citroën Saxo, Peugeot 306, Daihatsu Sirion og Toyota Yaris.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Tel. 345600 · fax 345607
Sýnsmennirnir eru at hitta:
Mána- til hósdag kl. 8.30-10.00 og 15.00-16.00
og fríggjadag frá kl. 8.30-12.00 og 13.00-16.00

# Dagrøktarmamma

## til Dagrøktina í Oyndarfjarðar kommunu

Søkt verður eftir dagrøktarmammu til Kommunalu Dagrøktina í Oyndarfjarðar Kommunu at byrja skjótast gjørligt.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá Sosialu deild hjá Runavíkar Kommunu á tlf. 417000.

Skrivlig umsókn skal vera Runavíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi 12. februar 2004.

**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur · 600 Saltangará

**Frá Føroya Postfelag:**

# Aðalfundur 2004

Aðalfundur felagsins verður í HB-húsinum tann 28. februar kl. 10.00.

Uppskot frá limunum skulu skrivliga verða nevndini í hendi í seinasta lagi 3 vikur áðrenn aðalfundin.

**Limaveitsla**
Nevnast skal, at veitsla verður í HB-húsinum sama dagin.
Tilmeldingarskriv hesum viðvíkjandi verður sent øllum limum.

**Nevndin**

# Vippuvognur 3,5 T



Nýttur til framsýning. Seldur við munandi avsláttri.

**Hansen, tlf. 218540**

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Skúrur til sølu

Lítli bíði/toilet skúrurin á Oyrargjógv verður við hesum lýstur til sølu.

Møguligur keypari skal taka skúrin og betong-fundamentið burtur og slætta økið.

Boð skulu verða LV í hendi í seinasta lagi hósdagin 12. februar 2004.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Birgir Johannesen, á tlf. 311333 ella teldupost bj@lv.fo.

**Landsverkfrøðingurin**

# Bilmekanikari

Søkt verður eftir royndum bilmekanikara at byrja sum skjótast.

Ringi til Heðin ella Finnboga á

**Tlf. 345400**

Meinhardt Arge

Øll hava eina góða síðu – pop.fo hevur 100



ÚTSØLUENDABRESTUR

ØLL ÚTSØLUVØRA - UPP Í 75% Í AVSLÁTTRI

NÝGGJ VØRA HEIMKOMIN

VEST MÓTI
Vestmanna • Tel 42 44 07

KLÆDNABÚÐIN
Skálavík • 36 11 34

# Leiðari

## til Elding í SMS

Til Elding í SMS í Tórshavn søkja vit eftir leiðara at byrja skjótast tilber.

Elding er leiðandi innan sølu av hvítvørum, tón-leikatólum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert leiðarastarv í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi. Løn og treytir verða ásettar í samsvari við útbúgving og royndir.

Vit vænta at tú er ágrýtin, stinn/ur í leiðslu og dugnalig/ur í samstarvi við okkara viðskiftafólk og samstarvsfelagar. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur útbúgving og royndir innan handil og sølu.

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi innan 15. februar 2004 og skal sendast til:

**Elding, Postboks 1289, 110 Tórshavn**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið fáast frá Mads A. Winther, stjóra, á tel 21 62 30

ELDING
- EIN BETRI LOYSN!

# Val av limum til UMBOÐSRÁÐIÐ fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

- **Í februar mánaði ár 2004 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

  Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2004.

  Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

  Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

  Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

- **Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

  Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

  Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi.

  Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

  Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni.

Tórshavn, 8. januar 2004
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · P.O.Box 329 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel+298 345600 · Fax+298 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

# Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið í samband við gerð av eini útstykking Úti í Gerðinum á Eiði boðin út í al-menna lisitatión.

Arbeiði fevnir í stuttum um gerð av einum uml. 200 m longum vegi og byggibúning av 13 grund-stykkjum.

Lisitatiónin verður á kommunuskrivstovuni á Eiði hósdagin 26. februar 2004 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast til í seinasta lagi hósdagin 5. februar við at gjalda kr. 5.000,- í veð-haldi á konto 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfar-ið er aftursent, í seinasta lagi eina viku eftir lisitati-ónina.

**Sp/f Teknistovan**
v/Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen, ráðg. Byggifrøðingar
FO-510 Gøta
Tel.: 442105 –Fax: 442107
email: klement@post.olivant.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!